KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 26, 2005
www.kaupthing.fo

# Oljuprísurin líka høgur enn

MARKNAÐARRÁK

Prísurin á brentolju helt sær oman fyri 57 dollarar tað mesta av farnu viku, og tað er enn mest óttin fyri, at framleiðararnir ikki megna at nøkta tørvin á brenniolju í vetur, sum heldur prísinum uppi. OPEC økti fyri góðari viku síðan framleiðsluna við 500.000 tunnum um dagin, men tað lækkaði ikki prísin. Orsøkin er, at tann oljan, sum er komin aftrat, er av ov lágari góðsku til brennioljuframleiðslu. At summarið ofta førir við sær ódnir í Meksiko-flógvanum stimbrar eisini oljuprísinum, tí har eru nógvir oljuboripallar.

### Lánsbrævarenturnar lækkaðar aftur

Tað gekk sum væntað. Eftir eitt kvink uppeftir fyri tveimum vikum síðani, lækkaðu lánsbrævarenturnar aftur av álvara í farnu viku. 10-ára danska rentan kom aftur niður undir 3,10%. Høgi oljuprísurin og væntanir um, at evropiski miðbankin, ECB, fer at seta rentuna niður, ávirka marknaðin í løtuni. Svenski miðbankin hevur júst sett rentuna niður við 0,50% og enski miðbankin umhugsar tað. Hetta leggur trýst á evropiska miðbankan.

### Partabrøv stýrd av oljuprísinum

Partabrævamarknaðirnir hava staðið seg ómetaliga væl síðani 1. mai, har t.d. Norðurlond eru hækkaði 10,6%. Eftir at oljuprísurin fyri viku síðani setti nýtt met og aftur nú hevur sliðið hetta metið, eru partabrævamarknaðirnir lagdir undir trýst. Ein sannroynd er tí, at vinningsstaðfestingar í ávísan mun eru farnar fram. Av tí oljan eigur sín leiklut í hesum, verður tað eisini gongdin í oljuprísinum, sum fer at avgera, hvussu partabrøvini fara at standa seg næstu dagarnar.

### Hesa vikuna

Umfamt høga oljuprísin koma fleiri lyklatøl hesa vikuna, sum kunnu flyta marknaðirnar. Úr USA koma tøl fyri brúskapar- og prísvøkstur umframt álitistøl. Úr Evropa koma prísvøkstur og álitistøl. Mest sannlíkt er, at partabrøvini fara at hava eina vánaliga viku. Vit vænta tó ikki, marknaðirnir skulu lækka nógv, áðrenn keyparar aftur fara at gera um seg soleiðis, at ein møgulig lækking verður avmarkað. Ein hendingarrík vika er fyri framman, við líkindi fyri rentulækkingum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 616,06 | 1,7% | ↑ |
| JPY | 5,65 | 1,2% | ↑ |
| GBP | 1.123,45 | 1,3% | ↑ |
| NOK | 93,63 | -0,8% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,31 | 0,5% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 176,64 | 0,8% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 94,84 | 0,6% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 65,96 | 0,2% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*




ÚTSØLA

NOA NOA miniature

BYRJAR MIKUDAGIN 29. JUNI 2005, KL. 08.00

ALT 1/2 PRÍSUR

MIKUDAGIN HAVA VIT OPIÐ TIL KL. 20.00

NOA NOA®
– Tróndargøta –

Sosialurin 341800